# Skatta- og avgjaldsmál avgerðir

| Mál nr.: 09-02-22-88 | Lóg: Kapitalvinningsskattalógin § 1, § 6 | Avgerð tikin: 29.11.2010 |
|---|---|---|

## Kapitalvinningur. Søludagur. Søla av partabrøvum til ikki-skrásett felag.


**Samandráttur:**

**Kært er um, at TAKS hevur broytt kapitalvinningssjálvuppgávu hjá kæraranum fyri 2007. Kærarin hevur selt síni partabrøv til Sp/f L undir stovnan tann 20. apríl 2007. Felagið er skrásett í Skráseting Føroya tann 8. juni 2007. Peningastovnurin skrásetir ikki søluna, fyrr enn felagið er skrásett, og TAKS brúkar dagin, har peningastovnurin skrásetir søluna, í samband við útrokningina av vinninginum av partabrøvunum, sum eru seld.**

**Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur avgjørt, at partabrøvini hjá kæraranum verða seld til Sp/f L undir stovnan tann 20. apríl 2007, og at kapitalvinningurin hesum viðvíkjandi skal roknast grundað á 20. apríl 2007 sum søludag.**


### Avgerð

**Kært er um,** at TAKS hevur broytt kapitalvinningssjálvuppgávu hjá kæraranum fyri 2007.

Kærarin hevur saman við A stovnað Sp/f L við tí endamáli, at smáparta-felagið skuldi keypa partabrøv kærarans.

Stovningarsamtykt er undirskrivað 20. apríl 2007 og tá hevur eisni stovnandi aðalfundur verið.

Keypsavtala viðvíkjandi partabrøvunum er dagfest 20. apríl 2007. Sambært kæruumboðnum skrásetir peningastovnurin tó ikki søluna/keypið, fyrr enn felagið er stovnað. Felagið er skrásett í Skráseting Føroya tann 8. juni 2007.

TAKS brúkar dagin, har peningastovnurin skrásetir søluna, í samband við útrokningina av vinninginum av partabrøvunum, sum eru keypt/seld.

Kæruumboðið førir fram, at tað er tann veruligi søludagurin tann 20. apríl 2007, sum er avgerandi í hesum sambandi, og hevur tí kært avgerðina hjá TAKS.

### TAKS
TAKS hevur ásett vinningin av partabrøvum at vera kr. 144.074,45 sambært upplýsingum frá peningastovninum.

### Kærarin
Kæruumboðið førir fram, at umrøddu partabrøv eru seld til Sp/f L undir stovnan við keypssáttmála frá 20. apríl 2007. Felagið er stovnað samstundis tann 20. apríl 2007.

Tað tekur nakað av tíð at stovna eitt felag, og peningastovnurin, sum hevði partabrøvini í depot, vildi ikki skráseta eigaraskiftið, fyrr enn felagið var stovnað.

Felagið er skrásett í Skráseting Føroya tann 8. juni 2008.

Gjørt verður galdandi, at avgerandi tíðarbilið fyri staðfesting av vinningi ern tá søluavtalan er inngingin, og ikki tá eigaraskiftið er skrásett hjá peningastovninum sum kontoførandi peningastovni.

**Avgerð hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini**
§ 12 í anordning nr. 1111 frá 20. september 2007 om ikrafttræden for Færøerne af lov om anpartsselskaber ásetir soleiðis:

> **§ 12.** Et selskab, der ikke er registreret, kan ikke som sådant erhverve rettigheder eller indgå forpligtelser. Det kan heller ikke være part i retssager bortset fra søgsmål til indkrævning af tegnet anpartsbeløb og andre søgsmål vedrørende anpartstegningen.
>
> *Stk. 2.* For en forpligtelse, der før registreringen indgås på selskabets vegne, hæfter de, som har indgået forpligtelsen eller har medansvar herfor, solidarisk. Ved registreringen overtager selskabet de forpligtelser, som følger af stiftelsesdokumentet eller er pådraget selskabet efter underskrivelsen af stiftelsesdokumentet.
>
> *Stk. 3.* Er der før selskabets registrering truffet en aftale, og vidste den anden aftalepart, at selskabet ikke var registreret, kan denne hæve aftalen, hvis anmeldelse ikke er modtaget i den færøske registreringsmyndighed senest ved udløbet af fristen i § 11 eller registrering nægtes. Dette gælder dog ikke, hvis andet er aftalt. Var aftaleparten uvidende om, at selskabet ikke var registreret, kan denne hæve aftalen, så længe selskabet ikke er registreret.
>
> *Stk. 4.* Et selskab, der ikke er registreret, skal til sit navn føje ordene "under stiftelse".

Eitt felag verður stovnað á stovnandi aðalfundi og er síðani til. Hóast eitt smápartafelag sambært anordning nr. 1111 frá 20. september 2007 om ikrafttræden for Færøerne af lov om anpartsselskaber ikki kann fáa rættindi ella átaka sær skyldur, áðrenn tað er skrásett sambært § 12, stk. 1, er einki forboð móti, at eitt smápartafelag byrjar sítt virksemi, áðrenn tað verður skrásett. At felagið byrjar sítt virksemi og harvið fær rættindi og átekur sær skyldur er harafturímóti fortreytað í stk. 2 og stk. 3 í somu grein.

Partabrøv mugu metast at vera seld/keypt við avtalu um hetta, tó ikki áðrenn eitt felag er stovnað.

Tað er sostatt avtalan millum partarnar, sum er avgerandi fyri, nær partabrøvini eru handlað, og tað er eisini avtalan, sum er avgerandi fyri, hvat virði partabrøvini eru handlað til. Í hesum sambandi er børsin bert eitt stað, ið skrásetir søluna, sum reelt er farin fram áðrenn.

At partabrøvini verða skrásett til ein hægri ella lægri kurs hevur ongan týdning, uttan so at partabrøvini veruliga verða handlað millum partarnar til henda hægri ella lægri kurs. Men tað er einki, sum bendir á, at hetta er støðan í hesum málinum.

Í hesum føri eru keypari og seljari knýttir at hvørjum øðrum og hava í ávísan mun felags áhugamál. Í einum slíkum føri er trupulleikin oftast at áseta rætta virðið á tí, sum selt er. Her er tó talan um børsskrásett partabrøv, sum eru handlað til tað kursvirðið, sum var galdandi á søludegnum. Partabrøvini eru tí seld til teirra reella virðið.

**Grundað á omanfyri standandi hevur Skatta- og avgjaldskærunevndin avgjørt, at partabrøvini hjá kæraranum verða seld til Sp/f L tann 20. apríl 2007, og at kapitalvinningurin hesum viðvíkjandi skal roknast grundað á 20. apríl 2007 sum søludag.**